# Færri eigarar er betri fyri vinnuna

**Tilfeingið eigur at umsitast av einum ella nøkrum heilt fáum fyritøkum - allarhelst privatum, sigur Pavel Salz, ið roknar við at fiskivinnutjóðir sum Føroyar noyðast at finna nýggjar loysnir fyri at fáa fatur á fiskimonnum. Framtíðar ungdómurin tímir ikki at vera til sjóðs í dagar og vikur**



Pavel Salz var í eini fimtan ár stjóri fyri hollendsku hagstovuni LEI. Ein av teirra stóru uppgávum var at framleiða fiskivinnuhagtøl til ES-nevndina. Tølini hjá Salz og LEI blivu brúkt tá ES skuldi avgera sín kvotu- og fiskivinnupolitikk. Hesa tíðina var LEI eitt av teimum leiðandi hagstovunum í heiminum innan fiskivinnu. Saman við Pavel Salz eru fleiri aðrir av teimum viðurkendu serfrøðingum hjá LEI farnir aðrastaðni at arbeiða, og í dag hevur hendan stovan ikki somu tyngd sum gjøgnum áttati og nítiárini.

– Tilfeingið eigur at umsitast av einum ella nøkrum heilt fáum fyritøkum - allarhelst privatum. Hetta vil økja um lønnsemi í vinnuni, tí at fyritøkurnar duga at síggja virði í vinningi yvir eitt longr tíðarskeið, sigur Pavel Salz,

## Ungdómurin sigur nei

Fyri trimum árum síðani valdi Pavel Salz at siga upp, og byrja fyri seg sjálvan som ráðgeva. Nú hann vitjar í Føroyum í samband við FAREC-ráðstevnuna skal han tosa um hvørjar loysnir hann metir europeiska fiskivinnan má velja í framtíðini.

– Um fá ár vilja allar fiskivinnutjóðirnar í Europa hava stóra trupulleikar við at fáa egnan ungdóm til at velja eitt lív sum fiskimenn. Tað føroyingar og aðrar fiskivinnutjóðir noyðast at viðurkenna er at vit standa yvirfyri stórum broytingum, trýr Pavel Salz. Hann er føddur í gamla Tsjekkoslovakia, men hevur síðani fyrst í sjeytiárunum verið hollendskur ríkisborgari.

– Óansæð hvat fiskimenn og politikarar siga og vóna. Fiskivinnan sum vit kenna hana í dag er við at fara í søguna. Tað vil í framtíðini vera sera trupult at fáa ungdóm til at gerast fiskimenn sum eru til sjóðs stóran partin av árinum.

Pavel Salz veit at hansara meiningar sjáldan frøða fiskimenn, men hann veit samstundis at hann hevur stuðul millum reiðarar og fiskimenn sum royna at hyggja inn í framtíðina.

## Ongan stuðul

Fyri fimtan árum síðani skrivaði Pavels Salz eina bók um fiskivinnu í norðuratlantshøvum. Nú umhugsar hann at geva út bókina av nýggjum og hyggja nærri eftir hvat sum hevur hent hesi árini. Vit spurdu hann hvat sum er farið fram?

– Tað vit hava sæð er at tey flestu londini hava valt at fara frá stuðulsskipanum til ein flota har javnbjóðis kapping millum skipini avgerð hvør sum klárar seg. Men hóast stórar broytingar, so velja fleiri lond framvegis at brúka almennar pengar til at tryggja at fiskiflotin ikki doyr út. Millum tey sum framvegis brúka almennan stuðul er ES. Men hóast hetta so kann ein siga at hugburðurin er broyttur. Fiskivinnan, myndugleikarnir og granskarar hugsa annarleiðis í dag, sigur Pavel Salz.

Hann meinar at tað er neyðugt at nýhugsan fær pláss, og at doyvandi almennur stuðul verður tikin burtur so fiskivinnan sjálv kann finna loysnir sum tryggja øllum atgongd til fisk eisini í framtíðini.

– Fiskivinnutjóðirnar noyðast at finna nýggjar vegir fyri at fáa fatur á fiski í framtíðini, sigur Pavel Salz.

– Í ES-nevndini eru tað framvegis fleiri sum hugsa uppá tann gamla mátan. Men møguliga síggja vit eitt ljós í hinum endanum av bergholinum. Eg hugsi serliga um Franz Fischler og einstakar av hansara nærmastu starvsfólkum. Hesi hava eftir mínari meting víst kunnleika og evnir til at hugsa nýggjar og víðgongdar tankar, sigur Salz og vísir til at Fischler millum annað tosar um eina umfatandi umlegging av fiskivinnuni, og at tann gamla skipanin má burtur.

Tað eru serliga fiskivinnutjóðirnar innan ES sum Salz kennir væl, sjálvt um hann eisini hevur arbeitt í menningarlondum og hevur fylgt gongdini í norðanlondum og Kanada. Hann sigur at óansæð hvar hann hevur verið, so hava fiskivinnusamfeløg eitt til felags, og tað er at leita eftir tí sum var.

– Tað sum sermerkir fiskivinnusamfeløg er ein vón um at alt skal vera sum tað einaferð var. Søguliga er hetta sera stuttskygt, tí ta'd vit minnast og kenna til er tann fiskivinannan sum hevur verið tey seinastu kanska 50-60 árini - og tey flestu av okkum minnast ikki so langt aftur í tíð heldur.

## Fiskivinnubýir hvørva

Í Stórabretlandi vilja bæði fiskimenn og politikarar geva ES skuldina fyri syndarligu støðuna bretska fiskivinnan er í ídag.

– At geva ES skuldina fyri vesaladómin er eingin gongd gøta, og at fara burturúr ES-fiskivinnupolitikkin vil ikki hjálpa bretum eitt einasta petti. At melda Stórabretlandi út úr ES gevur ikki meir fisk í havið. Hetta er ein léttisoppa hugsan sum skal geva fólkið eitt einkult svar uppá hví fiskurin ikki er í havinum longur.

Pavel Salz meinar at bæði bretar, ES og aðrar tjóðir sum hava trupulleikar við fiskivinnuni noyðast at seta sær nakrar álvarsligar spurningar og royna at finna svørini.

- Ungdómurin tímir ikki at vera til sjóðs, inntøkan er ov lág og tey flestu tosa um hvussu lítil framtíð tað er í fiskiskapi. At stór havøkir eftir øllum at døma ikki geva av sær nokk fisk til at eitt samfelag kann liva av fiskinum er eisini nakað ein noyðist at hava við í huganum. Fyri ES-londini er tað eisini ein stór avbjóðing at ein norskur ella føroyskur fiskimaður hevur eina inntøku sum liggur fýra ferðir hægri enn miðal inntøkan hjá ES-fiskimanninum.

Pavel Salz meinar at støðan í ES er komin hartil at samveldið noyðist at sleppa sær av við 70-80 prosent av sínum fiskimonnum.

– Um ES vil at teirra fiskivinna skal bera seg, og tann einstaki skal hava eina liviliga inntøku frá fiskivinnuni, so skuldi ES ikki havt meir enn 50.-60.000 fiskimenn. Í dag eru tað 200.000. Hetta lýsir rættiliga gott støðuna haldi eg. Hetta merkir eisini at fleiri smærri fiskivinnubýir vilja hvørva komandi árini.

Han roknar við at býir sum Aberdeen og Scrabster ikki hava nakað framtíð innan fiskivinnuna, og vísir til at býir sum Hull, Grimsby og Bologne longu eru farnir í søguna sum fiskivinnusamfeløg.

– Menningin krevur sítt, og tey smáu samfeløgini megna ikki at yvirliva krevjandi kappingina. Eg rokni við at vit um fá bert hava nakrar heilt fáar býir í ES sum liva av fiskivinnu, og hetta eru býir sum Peterhead í Skottlandi og Vigo í Spania.

Pavel Salz metir at hetta er ein góð loysn, um meiningin er at samfeløgini skulu yvirliva og geva nakað av sær.

– Vit noyðast at byggja upp eina fiskivinnu sum ber seg sálva, og hetta krevur at onkur má lúta. ES er komið á eitt vegamót har ein noyðast taka eina avgerð um leiðina víðari. Nú nyttar ikki at fylla í holini á tí gamla vegnum. Tað má byggjast ein nýmótans vegur, og hesin má byggja á eitt nýtt grundarlag, sigur Pavel Salz.

Hann meinar at tað fyrsta ES má gera er at broyta dagsins politikk um "relativan stabilitet". Hendan tvangstroyggjan er so slitin at hon má burtur, og sambært Salz arbeiðir ES-nevndini nú við at broyta hendan politikkin.

## Stovnar uttan mørk

Pavel Salz meinar at tað fleiri staðni er heilt skeivt at tosa um ein tjóðskap tá ein tosar um fiskastovnar.

– Fiskurin kennir eingi mørk. Tað verður tosa dogmatisk um ein rætt hjá eini tjóð. Hetta er ein grundleggjandi trupulleiki undir tí politikkinum vit hava havt í nógv ár. Norðsjógvurin er eitt gott dømi har fleiri tjóðir krevja sín part av fiskinum. Í staðin áttu vit at sæð tað sum er av fiski í Norðsjónum undir einum. Støðan í dag er at fiskastovnarnir verða niðurfiskaðir. Mín loysn er at ein ella nakrir heilt fáir leikarar sleppa inn á hendan vøllin. Helst ein, kanska tveir tríggir, umsitarar skuldu fingið í uppgáva at umsita allan fiskiskap í Norðsjógvinum. Hetta vildi gjørt at tilfeingið bleiv hagreitt á ein hatt sum tryggjad at fiskur var í økinum eisini til komandi ættarlið.

– Vit mugu hava meir privata kapping inn í fiskivinnuna, samstundis sum vit noyðast at hava ein nógv haðari stýrda umsiting av fiskiskapinum, sigur Pavel Salz. Han meinar at hetta kann loysast uppá fleiri mátar.

– Fiskirættindini kunnu leigast út, ella vit kunnu hava eina samtøku av reiðaríum sum kundu umsiti fiskiskapin á einum kommersiellum grundarlagi. Óansæð øoysn so er málið betri stýring við fiskivinnuni. Hetta er ikki ein uppgáva hjá myndugleikunum, ið hava so ómetaliga nógvar aðrar uppgávur sum teir kunnu taka sær av.

Pavel Salz trýr ikki at til dømis norðmenn kunnu halda fram við at halda lív í sínari fiskivinnu í Norður-Norra um teir ikki lata kapping koma í.

– Tað kunnu gevast nógvar góðar grundgevingar fyri at útjaðarin skal hava almennan stuðul fyri at halda lív í smáum plássum. Men hetta má ikki gerast ein koddi. Tey smáu samfeløgini noyðast at flóta í sær sjálvum og geva eitt fíggjarligt yvirskot. Soleiðis er tað ikki í dag. Tey flestu lond sum hava eina mundandi fiskivinnu noyðast at seta sær meir týðulig mál við síni fiskivinnu.









